Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Karlot Hergeirsson, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Flutningur av djórum millum lond

Spurningar:

1. Hví er tað ikki møguligt hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (HFS) at móttaka og avgreiða innflutningsloyvi fríggjadagar?
2. Er tað møguligt, at HFS kann útveita avgreiðsluna av innflutningsloyvinum til privatar djóralæknar?

Viðmerkingar:
Fleiri, sum eiga kelidjór, ynskja at kunna sleppa av landinum við sínum djórum í longri ella styttri tíðarskeið, tað verið seg til kappingar, til aling ella bara tí tey vilja hava sítt kelidjór við í feriu.

At flyta djór ímillum lond kann hava óhepnar avleiðingar við sær við tað, at djórið ótilvitað kann draga djórasjúkur, smittur og sníkar við sær.

Fyri at verja okkum ímóti hesum er kunngerð nr. 82 frá 18. mai 2021 lýst, og har stendur millum annað í § 20, at " *Hundar og kettur, sum skulu innflytast til Føroya, skulu kannast av løggildum djóralækna í sendaralandinum. Kanningin skal ikki vera eldri enn 2 dagar, tá ferðin úr sendaralandinum byrjar."* Hendan kanning skal sendast til HFS, sum so gevur endaligt loyvi at innflyta djórið. Tað skal gjaldast fyri hetta innflutningsloyvið.

Grundað á, at hesar kanningar ikki muga vera eldri enn 2 dagar, so stendur á heimasíðuni hjá HFS: "*Fráferðir kunnu bert vera úr sendaralandinum við hundi ella kettu hesar dagar – mikudag, hósdag, fríggjadag og leygardag*". Hetta er nokk tí, at HFS ikki hevur opið í vikuskiftinum, og tí ikki avgreiðir umsóknirnar um flutningsloyvi í vikuskiftinum.

Nógv av teimum, sum ferðast millum lond við sínum djórum, brúka Norrønu, tí at tað millum annað gevur eina betri vælveru fyri kelidjórið. Um ferðast verður við Atlantic Airways, so skulu djór omanfyri eina ávísa vekt í lastrúmið á flogfarinum, og tað eru nógvir djóraeigarar ikki so glaðir fyri.

Vetrarhálvuna er fráferð hjá Norrønu úr Hirtshals bert sunnudag, og sambært heimasíðuni hjá HFS ber hetta ikki til, tí innflutningsloyvi kann ikki avgreiðast til hesa fráferð. Hetta merkir so, at tað er eingin møguleiki at brúka Norrønu, og djóraeigarar eru meira ella minni avskornir frá at ferðast við sínum kelidjórum helvtina av árinum.

Tað kann undra, at HFS ikki kann avgreiða innflutningsloyvi, har flutningsdagurin er sunnudag, tí fríggjadagur, sum liggur 2 dagar áðrenn, er vanligur arbeiðsdagur.

Fyri at fáa greiðu á, hví mannagongdin hjá HFS er, sum hon er, og um tað er møguligt at gera broytingar á hesum øki, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 23. juni 2025

Karlot Hergeirsson